Sosialurin

# VARPIÐ

FRÍGGJADAGUR 18. mars 2005



**Hollywood og Holocaust**

Hóast tað hendi langt burturi frá USA, er tað meiri enn nakað annað amerikanskur filmur og sjónvarp, sum hava skapt myndirnar og medvitið um morðið á tær seks milliónirnar jødar undir Seinna Heimsbardaga. Men myndin var ikki eintýdd. Frá endanunm av 1920unum kom ein stórur partur av inntøkunum hjá Hollywood úr Týsklandi.

**Pálmasunnudag 20. kl. 22.20**





**The Choir Boys**

Teir hava langt hár og langt skegg. Teir bannast sum eingin annar. Men teir syngja sum einglar, hetta eru kórdreingirnir úr herberginum fyri tey heimleysu. Hesin kanadiski dokumentarfilmurin sigur søguna um nakrar heimleysar menn, ið hava fingið nýtt lívsinnihald takka verið kórsangi undir leiðslu av tí ungu eldsálini Pierre Anthian.

**Skírishósdag 24. kl. 21.50**

**Angi av eini kvinnu**

Studenturin Charlie (Chris O´Donnell) fær sær eitt arbeiði við síðuna av lestrinum. Hann fær arbeiði hjá tí eldra blinda pensjóneraða ovastanum Frank (Al Pacino). Hann skal ganga tí blinda til handa, og hetta er als ikki bara sum at siga tað. Tann sera illsinti Frank krevur at Charlie kemur við sær eitt vikuskifti til New York. Charlie torir ikki at siga nei.

**Fríggjadag 18. kl. 20.30**

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**